## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av útsynningi og regn. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Regn av og á og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Eg dugi ikki einki at gera«

**Fyrrverandi skúlalærarin Bjarni Holm keðir seg ikki, hóast hann er farin frá fyri aldur. Hann hevur ov mikið at takast við, og sum hann sjálvur sigur, so dugir hann ikki einki at gera.**

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*– Málið um náttarbussarnar hevur mín størsta áhuga, sigur Nikolina Johannesen av Argjum, sum var á ungdómstinginum í morgun*

*Mynd Jens Kristian Vang*

Inni í handilinum hjá Andriasi í Vágsbotni hitta vit fyrrverandi læraran Bjarna Holm. Sjálvur stendur Bjarni uttanfyri diskin og prátar, og innan fyri diskin stendur konan, Jóna, sum saman við trimum systkjum hjá sær eigur gamla handilin.

**■ Hvat fær tú dagarnar at ganga við?**

– Tað er er ringt at vita, hvat eg ikki geri. Tað hevur altíð ligið til mín, at eg dugi ikki einki at gera, so eg havi nokk um oyruni.

**■ Hevur tú altíð verið lærari?**

– Eg vaks upp hjá ommuni og abbanum á Tvøroyri, tí eg misti pápan sum fimm ára gamal. Hann doyði umborð á Cheerful, sum var fyrsta skipið, ið fór av minu undir seinna veraldarbardaga. Omman vildi hava, at eg fór at læra til lærara, hóast eg sjálvur hevði bestan hug til okkurt handaligt. Eg arbeiddi tó í kolanáminum í Hvalba í eina tíð, áðrenn eg fór til Havnar á skúla.

**■ Hvørjum vil tú heilsa?**

– Eg kann heilsa guðsoninum, løgmanni. Eg havi fleiri ferðir sagt við hann, at tað nyttar einki at tosa um visjón 2015, fyrr enn man hevur broytt hugburðin í fólki, men eg veit ikki, um hann lurtar eftir mær

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | -2 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 8 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | -12 |
| Moskva | -21 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -10 |
| Bukarest | -6 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 7 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 3 |
| Malta | 8 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | -1 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Ein hátrýstryggur, 1025 hPa. frá Grønlandsfjørðinum til havið vestan fyri Írland fer eystureftir og verður yvir Føroyum hósdagin. Eitt lágtrýst, 983 hPa. við Lindesnes fer í landsynning.




**Í dag:**
Hátrýstið við Írland og ein hátrýstryggur til Føroya fara eystureftir, so lýggjari luft rekur móti Føroyum av útsynningi.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 7/2 kl. 06[00]– 8/2. 06[00]. Hitin í gjár: 2,1°
Minsti hiti máldur í febr.: -11,0° - Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 7/2 kl. 06[00]– 8/2 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 37,8 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 30. januar | Mánin næstur jørðini |
| 5. februar | Fyrra kvarter |
| 13. februar | Fullmáni |
| 14. februar | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 8. Febr. | 02.59 | 15.25 | 01.59 | 14.25 | 02.14 | 14.40 | 04.59 | 17.25 | 05.59 | 18.25 | 01.14 | 13.40 | 00.14 | 12.40 | 03.14 | 15.40 | 04.14 | 16.40 | 02.44 | 15.10 | 03.59 | 16.25 |
| 9. Febr. | 03.51 | 16.16 | 02.51 | 15.16 | 03.06 | 15.31 | 05.51 | 18.16 | 06.51 | 19.16 | 02.06 | 14.31 | 01.06 | 13.31 | 04.06 | 16.31 | 05.06 | 17.31 | 03.36 | 16.01 | 04.51 | 17.16 |
| 10. Febr. | 04.42 | 17.06 | 03.42 | 16.06 | 03.57 | 16.21 | 06.42 | 19.06 | 07.42 | 20.06 | 02.57 | 15.21 | 01.57 | 14.21 | 04.57 | 17.21 | 05.57 | 18.21 | 04.27 | 16.51 | 05.42 | 18.06 |
| 11. Febr. | 05.31 | 17.53 | 04.31 | 16.53 | 04.46 | 17.08 | 07.31 | 19.53 | 08.31 | 20.53 | 03.46 | 16.08 | 02.46 | 15.08 | 05.46 | 18.08 | 06.46 | 19.08 | 05.16 | 17.38 | 06.31 | 18.53 |
| 12. Febr. | 06.16 | 18.39 | 05.16 | 17.39 | 05.31 | 17.54 | 08.16 | 20.39 | 09.16 | 21.39 | 04.31 | 16.54 | 03.31 | 15.54 | 06.31 | 18.54 | 07.31 | 19.54 | 06.01 | 18.24 | 07.16 | 19.39 |





I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

i
Sosialurin

Lesið Sosialin


5 707265 100043 >